# Virkisætlan fyri tað pedagogiska arbeiði hjá

# ”Býlingshúsinum Undir Brúnni”

**Okt. nov. og des. 2017**
Hettar er serliga ein tíð hvar vit eru meira og meira innandura og leggur upp til at fara í gongd við ymisk kreativt s.s mála, klippa, klistra.

Heysti og veturin er ein tíð har okkara mentan við søgum, sagnum og sangum er ein stórur partur av dagligdegnum.

Mentanin hesar mánaðirnar hevur eisini nógv áhugavert at bjóða.
Vit hava verkætlan um heystarlívið, vit tosa um seyð, slakt, ull og inndraga føroyskan mat á ymiskan hátt.

Í des. hava vit eitt kreativt jólaverkstaða, og vit hava adventsløtur har vit syngja og hoyra søgur.
Vit fara til barnajólagudstænastu og eta jóladøgura saman við børninum.

- vika 41 – Heystarverkætlan
- vika 47 – Jólaverkstaður

**Jan. feb. mars og apríl 2017**
Í jan. feb. mars og apríl hava vit serliga fokus á okkara mentan. Sum tað framgongur í okkara námsætlan er hettar m.a. fyri at barnið kennir og virðir okkara mentan.

Hettar gera vit við at í dagligdegnum tosa og gera tey vitandi um okkara halgu- og merkisdagar og hví vit hava hesar dagar. Vit læra tey sangir, føroyskan dans og hava ymiskar verkætlanir í dagligdegnum.

- 27.feb. - Føstulávint
- 12.mars - Grækarismessa
- 13.-17. apríl - Páskir
- vika 17 – Umhvørvisvika
- 25.apríl - Flaggdagin



**Mai og juni 2017**
Í maj og juni er tað “Børn og náttúra” sum vit leggja dent á, hettar gera vit við at fara ymiskar túrar, bæði stovuvís og felags.
Í ár fara vit at at vitja ymisk støð í býnum, í fjøruni og í nærumhvørvinum.

Aftur í ár fara vit at hava verkætlan um planting. Vit fara at sáa ymiskar urtir og grønt, sum vit seta út í “køkshavan” tá veðrið er lýggjari.

Í blómuvikuni hava børnini hvør sína blómu við sum tey so seta niður ymsastaðni runt í garðinum.

Vit hava garð dag har vit saman við børnum og foreldrum, rudda og hampa garðin, eisini hava vit ætlanir um at økja um okkara “køkshava”.

“Ommu og abba dagur” verður og her verða allar ommurnar og abbarnir bjóðaði á stovnin ein seinnapart til ein drekka mun saman við barninum.

Hettar er eisini síðsta tíðin hjá teimum størstu børnunum áðrenn tey fara víðari í lívinum. Og í tí sambandi fara tey fara ein dagstúr út á bygd og tey fara við til “112” dagin.

- 18.mai – Garðdagur
- vika 20 – Blómuvika
- 24.mai – ommu og abba dagur
- 4.-5.juni - Hvítusunna
- 112.dagur -
- Útferð fyri teimum stóru børninum
- 16.juni - Summarveislan í økinum

**Juli 2017**
Í juli hava vit ongar plan-lagdar aktivitetir, vit eru meira spontan, njóta garðin og fara ymiskar túrar.



- Stongt í viku 29-30-31

**Aug. og sep. 2017**
Tað er sera umráðandi at tey nýggj børn og foreldur fáa eina góða byrjan á stovninum. Tí er tann fyrsta tíðina her nógv ávirkaði av innkoyringum og at fella til aftur eftir summarsteðgin.

Í Seinnu helvtini av august halda vit á fram við evninum “Børn og náttúra” og vit fara aftur ymiskar túrar, saman og hvør stova sær.

Í heystarvikuni taka vit upp úr køkshavanum og børnini fáa ein døgurða við tilhoyr frá køkshavnaum.

- Vika 39 - Heystavika

**Virkisætlan fyri tað pedagogiska arbeiði hjá**

**”Býlingshúsinum Undir Brúnni”**

**fyri 2017**

Dokumentatión:

Vit hanga myndir upp, skriva dagbók og tosa við foreldur um hvat vit gera.

Vinarliga

Starvsfólkið